VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Hvassur vindur ella skrið av útsynningi og stundum regn ella mjørki. Seinnapartin minkar hann vindin niður í ein strúk og tað klárar í, tó ælingur. Hitin millum 9 og 12 stig.



Veðrið leygardagin:
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og regn av og á. Hitin millum 7 og 10 stig.



Veðrið sunnudagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og fyrrapartin regn, men annars yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Mánadagin lot til andøvsgul av suðri og møguliga turt, men týsdagin upp í stívt andøvsgul av vestri og ælingur, partvís heglingur. Hitin millum 3 og 7 stig.

Rúm yvir hav í Lítluvík

Í gjár lat Philippe Carré upp listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík undir heitinum »Rúm yvir hav…«

LISTAFRAMSÝNING
Ingrid Bjarnastein

Í hesum døgum sýnir fransmaðurin Philippe Carré fram í Lítluvík
Mynd: Jens Kr. Vang

Seinnapartin í gjár lat Philippe Carré upp listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Listaframsýningin hevur fingið heitið »Rúm yvir hav…«. Talan er um eina nýggja røð av grafiskum prentum av føroyskum bygdum.

Philippe er ikki heilt ókendur innan føroyska listaheimin. Hann hevur síðani 1982 sýnt fram í Føroyum. Fyrstu ferð á ólavsøkuframsýningini, og hevur hann annars verið í Lítluvík fleiri ferðir, og verið í Norðurlandahúsinum og á fleiri ólavsøku- og várframsýningum.

Bygdirnar, sum Philippe hevur avmyndað hesuferð eru: Hestur, Skúvoy, Hattarvík, Kirkja, Árnafjørður, Mikladalur, Bøur, Elduvík, Tjørnuvík, Fámjin, Dalur og Húsavík. Í hesi nýggju røðini eru 30 nýggjar myndir, allar monotypi í linoliumsprenti, har bæði pressa og skeið eru nýtt.

Myndirnar eru gjørdar í grafiska verkstaðnum hjá Listaskúlanum, ið er undir Tórshavnar kvøldskúla. Harumframt verða eisini nakrar eldri myndir at síggja, umframt málningar og pappírsklipp.

Philippe er annars fransmaður, føddur í bygdini Mailly-la-Ville í Bourgogne í Fraklandi í 1953. Hann er útbúgvin myndamaður, og hevur síðani 1982 arbeitt burturav sum listamaður. Meginpartin av hesi tíðini hevur hann verið búsitandi í Føroyum.

Framsýningin »Rúm yvir hav…« lat upp í gjár, og verður hon opin hvønn dag frá 14–18 til og við 24. mars.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	1
Nuuk	÷3
Qaqortoq	0
Ammassalik	0
Saint John's	÷5
Halifax	÷6
Reykjavík	4
Seyðisfjørður	6
Tórshavn	9
Lerwick	8
Aberdeen	9
London	11
Tromsø	÷6
Bergen	4
Oslo	–
Stokkhólm	10
Keypmannah.	4
Helsinki	÷6
Moskva	0
Berlin	4
Warzawa	8
Kiev	3
Bukarest	8
Paris	14
Madrid	11
Róm	13
Malorca	16
Athen	12
Malta	14
Tunis	15
Beijing	9
New Dehli	27
Bangkok	33
Jakarta	31
Sydney	–
New York	5
Miami	28
Los Angeles	17
Meksikobýur	–
Panama	29
La Paz	13
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	30

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt djúpt lágtrýst, 957 hPa. sunnan fyri Hvarvið fer móti Grønlandsfjørðinum og brúgvalagið haðani verður yvri Føroyum fríggjanáttina.



Lágtrýstið yvir Grønlandsfjørðinum fer spakuliga í landnyrðing og kuldabrúgvin til Føroya fer eystureftir.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 19/03 kl. 06⁰⁰– 20/03 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,0°
Minsti hiti máldur í mars.: ÷8,7° Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,2 mm – mált frá 19/03 kl. 06⁰⁰–20/03 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mars: 74,2 mm

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG

12. MAÐUR
www.footballsupporters.fo

VESTFALLSKYRRINDI

18. mars: Fullmáni
19. mars: Mánin næstur jørðini
25. mars: Seinna kvarter

Kelda: Almanakkin 2003

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
21. mar	08.48	21.14	07.48	20.14	08.03	20.29	10.48	23.14	11.48	—	07.03	19.29	06.03	18.29	09.03	21.29	10.03	22.29	08.33	20.59	09.48	22.14
22. mar	09.41	22.03	08.41	21.03	08.56	21.18	11.41	—	00.14	12.41	07.56	20.18	06.56	19.18	09.56	22.18	10.56	23.18	09.26	21.48	10.41	23.03
23. mar	10.35	23.03	09.35	22.03	09.50	22.18	00.03	12.35	01.03	13.35	08.50	21.18	07.50	20.18	10.50	23.18	11.50	—	10.20	22.48	11.35	—
24. mar	11.31	—	10.31	23.13	10.46	23.28	01.03	13.31	02.03	14.41	09.46	22.28	08.46	21.28	11.46	—	00.18	12.46	11.16	23.58	00.03	12.31

5 707265 100050 >